# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Nýggj nevnd í Føroyingafelagnum í Århus



*Nýggja nevndin í Føroyingafelagnum í Århus. Afv.: Gunnar Hansen, Beinur Guðjonsson, Leifur av Trøð Trondesen. Ffv.: Anna Trónd Hansen, Jóngerð Danielsen*

Leygardagin 25. februar var aðalfundur í Føroyingafelagnum í Århus. Har varð nýggj nevnd vald, og nevndin hevur nú skipað seg. Formaðurin seinastu tvey árini, Marja Gjógvará, og Bárður Joensen tóku ikki við afturvali. Nýggi formaðurin í Føroyingafelagnum í Århus eitur Gunnar Hansen av Toftum. Hann hevur eitt ár á baki í nevndini og tekur nú við fremstu avbjóðingini í felagnum. Beinur Guðjónsson heldur fram sum næstformaður og Leifur av Trøð Trondesen heldur fram sum kassameistari. Anna Trónd Hansen og Jóngerð Danielsen vórðu á aðalfundinum valdar í nevndina á fyrsta sinni. Anna er skrivari, og Jóngerð tekur við sum PR-limur, ið nýggi formaðurin hevur røkt seinasta árið.

Nýggja nevndin sigur seg fegnast um sera jaligu gongdina í felagnum, og tað er vorðið alsamt meira spennandi at vera føroyingur í Århus.

**Dagurin**

**4. mars. Adrianus,** deyður umleið ár 300. Keisarligur rómverskur embætismaður sum gjørdist kristin og tí varð tikin av døgum. Navnið merkir maður úr Adria í Norðuritaliu. Navn á fleiri keisarum. Magnus Heinason føddur hendan dagin í 1545.

**5. mars. Teophilus**, deyður umleið ár 200. Embætismaður í Kesarea. Navnið merkir hin guðelskandi

**6. mars. Gotfred**. Óvist er, hvønn sipað verður til. Summir halda ein kardinal í Róm, deyður umleið ár 1100, aðrir ein biskup í Amiens, deyður í 1115. Týskt navn settsaman av orðunum Guð og friður.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Kistan við Dánjal Petersen**, vanliga nevndur **Dánjal í Gerðinum, í Vestmanna**, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum í dag kl. 17. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 14 úr Vestmanna kirkju.

**Martha Vang í Hvalba** andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi 2. mars, 75 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum sunnudagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Hvalbiar kirkju mánadagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Marthu kunnu lata eina peningagávu til Eldrasambýlið í Hvalba. Konto í Føroya Banka.

**Malena Thomsen á Tanganum**, Hvalba, andaðist á Eldrasambýlinum í Hvalba sunnudagin 26. februar, 90 ára gomul. Farið verður úr kapellinum á Tvøroyri fríggjadagin 3. mars, kl. 18. Jarðarferðin verður úr Vitninum leygardagin 4. mars, kl. 13.30. Tey, ið vilja minnast Malenu, kunnu lata Eldrasambýlinum í Hvalba eina gávu.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, abbi og bróður okkara

**Sofus A. W. Rubeksen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólki á heimarøktini og til tykkum á Lágargarði, sum tóku tykkum so væl av honum.
Tøkk til Sverra Steinhólm fyri góð og troystarrík orð í kirkjuni.
Tøkk til tykkum øll, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervinum á Lágargarði.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Lágargarð og tøkk til øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jan, Annika, Maibritt og Lucas**

# Tøkk

Hjartans tøkk til øll tykkum, sum vístu samkenslu og hjálpsemi tá elskaða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Solveig Pauline Jacobsen**
fødd Kjærbo

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og øllum tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Ein serstøk tøkk til Heimið við Vallalíð, Tjarnargarð og Dagtilhaldið við Dalavegin.

**Børnini við familjum**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at kæri maður og pápi okkara

**Dánjal Petersen**
vanliga nevndur Dánjal í Gerðinum
Vestmanna

andaðist mikumorgunin 1. mars, 61 ára gamal.

Bønarhald verður á Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju leygardagin 4. mars kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Halbjørg og Súsanna**